**BILANLÆG**
Kvalitets auto-hifi JBL forstærker P80.4 (4x90 W) Ubrugt og en P80.2 (2x180 W) brugt i 30 timer. Rockford fosgate sab 10'' i kasse samt div. ledninger. Nypris ca. 11.000 kr. nu 6.000 kr.
*Tlf. 583034*

## Út- & Sjónvarp

**TIL SØLU**
Ein parabolskál (1 m) og ein LNB (0.3 db) selist fyri einans 1.000 kr. Bæði eru 3 mán. gamalt.
*Tlf. 224943*

**28'' SJÓNVARP TIL SØLU**
Telefunken, í góðum standi, selist vegna plásstrot fyri 2.000 kr.
*Tlf. 421331 ella 271836*

**TELEVARP BOKS TIL SØLU**
Nýprísur 1.600 kr. Hann fer fyri 1.000 kr. Tá fylgja káplar við.
*Tlf. 318401 ella 584567*

**RADIO**
Radio ynskist til keyps frá 1970-árinum. Hevur tú eitt slíkt standandi, ring vinarliga á
*Tlf. 519613*

**SJÓNVARP**
1 ára gamalt JVC sjónvarp til sølu. Silvurgrátt og 25''. Sjónvarpið er sum nýtt. Til sølu fyri 4.000 kr. Ger kvetti og spar 3.000 kr.
*Tlf. 448097*

**PARABOL**
v/ digitalum móttakara og motori, skál 120 cm, til sølu fyri einans 4.000 kr.
*Tlf. 214831 ella 314831*

## Ymiskt

**FARTELEFON VIÐ OUTLOOK**
Msn messenger, internet explorer, media player (mp3), nógvum spølum og programmum. GPRS, MMS og kann avspæla allar ljóðfílar sum ringitóna. Sær út sum nýggj. 128 mb SD-kort fylgir við. Einans 1.100 kr. Ring
*Tlf. +45 26275314*

**HUGSAR TÚ UM HEILSUNA?**
Eg havi ein góðan venjingarbonk við nógvum hentleikum bíliga til sølu
*Tlf. 211034*

**FRAMSÝNING AV PATCHWORK**
Heldur fram vikuna út hjá Dianu í Saltangará
*Heimaseyming*

**FLYTIGÓÐS TIL ELLA ÚR DANMARK**
Næsti túrur: til DK 14. okt. Heimaftur 25. okt. Kostnaður 750 kr. kubilmeturin. Ringi til
*Tlf. 213223 ella 226758*

**FLOGFERÐASEÐLAR**
við Mærsk. 4 apex ferðaseðlar Vágar/Kastrup og aftur verða seldir fyri 2.500 kr. stk. Mugu vera brúktir í seinasta lagi 31. oktober 04.
*Tlf. 422303 - 722566*

**GER KVETTI**
Alt lítið brúkt og er í sera góðum standi til sølu. Pace analog móttakari kr. 350,-. Electrolux barrskáp v/ køliskápi 70x56x40 kr. 800,-. Pioneer mini stereoanlæg v/ hátalarum kr. 800,-.
*Tlf. 422310 ella 545155*

**MÁLNINGUR TIL SØLU**
Av William Heinesen. Motiv: Úti í Bakka. Ár 1932. Pastell, stødd v/r 70x60.
*Tlf. 212289*

**OMEGA LUMMAUR**
Orginalt Omega Grand Prix 1900 ur, við leður lumma. Silvur við gull legering. Stødd Ø 52 mm H 15,5 mm. Kassa nr. 6177038, urverk nr. 5395096. Perfekt til føroyska búnan. 2.500 kr.
*Tlf. 314587*

**NOKIA 8210**
Lítið brúkt fartelefon í sera góðum standi, virkar perfekt. Við ladara. Einans 900 kr.
*Tlf. 314587*

**NIKON COOLPIX 3500**
Lítið brúkt digitalt kamera, 3,2M pixel við ladara, 64MB Compact Flash, nýtt battarí, USB2 kortlesari. Í sera góðum standi, virkar perfekt. 2.300 kr.
*Tlf. 314587*

**TVEIR FLOGFERÐASEÐLAR**
Millum Føroya og Danmark við Mærsk Air bíliga til sølu. Mugu brúkast áðrenn 30. okt.
*Tlf. 218239*

**NOKIA 7250I**
Við camera til sølu fyri 1.500 kr.
*TLf. 216778*

**NOKIA 3100**
Til sølu fyri 800 kr.
*Tlf. 216778*

**SOLARIUM SELIST BÍLIGAA**
Er hvítt, b 110, h 120, l 220. Undir 16 rør, yvir 18 rør v/ andlitssól. Má avheintast í stórum bili.
*Tlf. 510727 ella 310727*

**STÓR SÍL Í NESVATNI**
Ein hevur fiska 19 ferðir og fingið 17 síl. Tað største 6 kg. Nøkur eru eftir enn.
*Tlf. 447565 ella 260887*

**ELDRAFELAGIÐ NÓN**
Vit koma saman í húsum felagsins í Torvgøtu 2 mánadag til fríggjadag frá kl. 15.00 til 18.00, har vit kunnu hugna okkum og fáa ein drekkamunn
*Eldrafelagið Nón*

**ARGJAVEITSLAN**
Verður í róðrarneystinum 30. okt kl.19.30. Fimmboði Lisberg og Jógvan Olsen undirhalda og spæla til dans. Kostnaður 275 kr. Tilmelding: Noomi tlf. 317982/255308, Edvard tlf. 317835/217835.
*Argja Róðrarfelag/Argja Bóltfelag*

**ÚTHURÐ TIL SØLU**
Brúkt mahognyúthurð. Breidd 90, hædd 210. Gongur høgra inn, til sølu fyri 4.000 kr.
*Tlf. 220338*

**ÚTHURÐ TIL SØLU**
Brúkt plastikúthurð br. 96 h. 209. Gongur vinstra inn, til sølu fyri 5.000 kr.
*Tlf. 220338*

**RENNIBAND TIL SØLU**
Fyri 1.000 kr. Nývirðið 2.000 kr. Lítið brúkt.
*Tlf. 448127*

**FUJICA SPEGLREFLEKS**
fototól við blitz og tveimum eykalinsum til sølu.
*Tlf. 218159*

**HVÍTT BAÐIKAR**
Stødd 130x70 við 2 síðuplátum til sølu fyri 900 kr.
*Tlf. 317590*

**TIL SØLU**
Ein lítið brúktur Orbitrek treningsbonkur til sølu fyri 1.200 kr. Nýprísur 2.500 kr.
*Tlf. 229723*

**EFTIRLÝSING - SANDOY**
Eldhús-rabatmerkini frá 60-unum og 70-unum verða eftirlýst. Latið finningartløn/samsýning.
*Tlf. 321291*

**JÓLASØLA**
Árliga jólasølan hjá Føroya Heimavirkisfelag verður í Ítróttarhøllini á Nabb 27.-28. nov. Tilmelding innan 15. okt. Hjá Jórun
*Tlf. 317911*

**NOKIA N-GAGE**
Ein lítið brúkt NOKIA N-Gage selist fyri kr.1.800. Ring
*Tlf. 517376*

**TI 83 TELDUHVØLPUR**
til sølu fyri 400 kr. Væl egnað til student/HF.
*Tlf. 214831 ella 314831*

**BYRSA TIL SØLU**
Browning 1/2 aut. Gold Sport v/ 3 Chokes: 9.785 kr. Mossberg Macerick mod. 88 Pumgun v/ 1 shokes: 2.785 kr. Á goymslu júst nú.
*Tlf. 422445 ella 250105*

**ER TAÐ NAKAR**
sum manglar eina myrkabrúna wc-kummu ella hondvask. Ring
*Tlf. 744994*

**EIN EIK HARMONIKU-HURÐ**
Til sølu. 211 cm høg og 318 cm breið.
*Tlf. 444994 ella 744994*

**TIL SØLU**
Eitt solarium við 38 rørum. 2 tenn til Brøyt x21. Ein Frank Thomas jakki/buksur XL (MC-klæðir)
*Tlf. 441515, 229023 ella 259164*

**MÁLNINGUR**
Av William Smith til sølu um hóskandi boð fæst. Málningurin er av Porkeri og er málaður í juni 1978. Stødd 85x100 cm.
*Tlf. 214658*

**XEROX WORKCENTRE XE60**
kopimaskina og Okifax OF-8m sera bíliga til sølu.
*Tlf. 218903*

**FARTELEFON**
Sony Ericsson T610 + nógv eykaútstýr bíliga til sølu. Kostaði nýtt uml. 4.000 kr.
*Tlf. 218903*

**SAMSUNG E700 KLAPTELEFON**
Við innbygdari antennu og í lekrum sniðið v/ myndatóli og litskermi. Hevur 9MB dynamiskt memory. Til sølu fyri 2200,- ella hægsta boð yvir.
*Tlf. 255909 aftaná kl. 15*

**KONTAINARAR**
1 stk. 40 fót kontainari til sølu. Stoypt gólv og ljósamatur í sera góðum standi. Til sølu fyri kr. 15.000
*Tlf. 226445*

**NÝGGJAR RAMMUR**
21 stk. ymsar støddir, úr mahogni, til sølu fyri 20.000,- Nýprísur 50.000.
*Tlf. 226445*

## HEILSANIR



**Hey Sámal Jákup**
Góði babba. Eg og mamma ynskja tær hjartaliga tillukku við 28 ára degnum 5. okt.
**Heilsan Marjun**



**Góði Pætur og Páll Jóhan**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum 5. og 7. okt. Jesus pápi signi tykkum. Gleða okkum til vít siggjast. Heilsan frá okkum í Hirthals.
**Mamma/omma**



**Góða Anja**
Hjartaliga tillukku við 18 ára degnum 6. okt.
**Heilsan Sandra og Steingrímur**



**Góða Ragnhild**
Hjartaliga tillukku við 17 ára føðingar-degnum, sum var tann 29. sept.
**Ynskja Selma, Dánjal Jákup og Pauline**



**Góði Leivur gubbi**
Hjartaliga tillukku við 15 ára degnum 4. okt. Vónandi fært tú ein góðan dag.
**Heilsan lítla Marjun**



Hey Mcfólkið, sum vóru við á túrinum í Suðuroy. Túsund takk fyri eitt gott vikuskifti.
Anders hvar er hin gardinan?
**Heilsan Myndatakarin**


## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..........................................................................
Bústaður: ..........................................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«




## UTTAN ÚR HEIMI

# Aftur ein javnleikur

**Sjónvarpsdysturin gjáranátina ímillum tey bæði amerikonsku varaforsetaevnini, Dick Cheney og John Edwards, endaði javnur**


VALSTRÍÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*




*Tað endaði javnt ímillum Dick Cheney og John Edwards.Tað endaði javnt ímillum Dick Cheney og John Edwards*

Sum væntað brúktu teir báðir nógva tíð til at umrøða viðurskiftini í Irak og sjálva avgerðina um krígið.

John Edwards vísti á, at sambært fyrrverandi umsitingarleiðaranum í Irak, Paul Bremr, hevur USA ov fáar hermenn í Irak, og harafturat vísti hann á, at sambært Donald Rumsfeld, verjumálaráðhara kann USA ikki prógva, at nakað samband var ímillum Saddam Hussein og yvirgangsfelagsskapin al-Qaeda.

Cheney svaraði ikki beinleiðis.

Tað var týðiliga Edwards, sum var tann meiri ágangandi. Hóast hann ikki hevur serliga drúgvar politiskar royndir, eydnaðist tað honum at vísa á, at hann hevur eina greiða uppfatan av, hvønn uttanríkispolitikk USA eigur at reka. Eins og John Kerry helt hann, at USA hevur átikið sær alt ov tungar byrðar í Irak.

– Vit hava 90 prosent av hermonnunum. 90 prosent av teimum hermonnunum, sum doyggja, eru okkara, og amerikonsku skattgjaldararnir rinda 90 prosent av útreiðslunum í Irak, segði John Edwards.

Cheney vísti á, at irakska stjórnin er tann týdningarmesti sameindi hjá USA í Irak, og hann minti hyggjararnar á, hvussu nógv irakska fólkið hevur mist.

Teir vóru annars ójavnir, tann brosandi Edwards og tann álvarssami Cheney, sum eisini tóktist troyttur og líkasælur viðhvørt. Eygleiðarar í USA halda, at varaforsetin var ikki so sannførdur, sum hann vanliga tykist vera. Hinvegin halda eygleiðararnir, at tað eydnaðist Cheney at bøta eitt sindur um tað vánaliga skoðsmálið, sum Bush fekk aftan á sjónvarpsdystin ímóti Kerry í síðstu viku.

Sambært amerikonsku fjølmiðlunum endaði dysturin gjáranáttina við javnleiki. Næsti dystur verður fríggjakvøldið, tá Bush og Kerry hittast aftur.

# Iranskar rakettir kunnu raka mál í Evropa

**Iran hevur útvegað sær eitt nýtt slag av rakettum, og sambært fyrverandi forsetanum bera tær langt**


VÁPN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*


Fyrrverandi iranski foretin Hashemi Rafsanjani sigur við BBC, at Iran hevur fingið sær eitt nýtt slag av rakettum, sum kunnu raka mál 2000 kilometrar burturi. Tað merkir, at tær kunu raka mál í landssynningspartinum av Evropa.

Herfyri royndu iranar eina rakett, men tá varð hildið, at talan var um eina rakett av slagnum Shahab-3, sum kunnu raka mál 1300 kilometrar burturi. Men sambært Rafsanjani kann hetta hava verið ein av teimum nýggju rakettunum.

BBC sigur, ar tær nýggju rakettirnar hava elvt til stúran í Washington og Jerusalem, sjálvt um iranar halda uppá, at teir ætla bara at nýta rakettirnar til sjálvverju. Serliga í Ísrael hava tær nýggju rakettirnar vakt ans, samstundis sum ísraelsmenn stúra fyri, at Iran er komið væl ávegis við royndunum at fáa sær kjarnorkuvápn. Ovastin fyri ísraelsku fregnartænastuni sigur við BBC, at um eitt hálvt ár verða iranar væntandi førir fyri at gera ta fyrstu kjarnorkubumbuna.

# Kravdi 3.000 mannalív

Myndugleikarnir í Haiti siga nú, at ódnin Jeanne kravdi meiri enn 3.000 manalív, tá hon herjaði landið í síðsta mánað.

Tann endaliga uppgerðin hjá myndugleikunum sigur, at ódnin kravdi 3.006 mannalív. Av teimum búðu 2.826 í býnum Gonaives, sum varð serliga meint raktur av ódnini, tí ein flóðalda legði ein stóran part av býnum undir í sjógvi.

Sostatt hava náttúruvanlukkur kravt umleið 5.000 mannalív í Haiti í ár. Í mai druknaðu umleið 2.000 fólk í einari vatnflóð.

## Leita eftir oljuinntøkum

Í USA vilja demokratarnir í Kongesssini hava eina frágreiðing um, hvussu amerikanararnir hava umsitið oljuinntøkurnar hjá Irak síðani innrásina, og hvussu tætt sambandið hevur verið ímillum amerikonsku stjórnina og fyritøkuna Halliburton, sum Dick Cheney, varaforseti, hevur verið stjóri í.

Í mai í 2003 yvirtóku amerikanararnir alla umsiting í iraksku oljuvinnuni, og hon bleiv ikki latin iraksku stjórnini fyrr enn í juni í ár. Demokratarnir vilja hava at vita, hvat teir nógvu oljupengarnir vórðu nýttir til teir trettan mánaðarnar.

Skjøl, sum fyrr eru komin fram, hava avdúkað, at júst Halliburton hevur fingið fleiri sera virðismiklar sáttmálar í Irak, men stjórnin hevur sýtt fyri at lata Kongressina fáa avrit av sáttmálunum. Tað er verjumálaráðið, sum hevur sáttmálarnar um hendi, men nú er líkt til, at politikararnir hava funnið ein veg uttan um Pentagon. Mánadagin fingu fleiri av teimum størstu amerikonsku bankunum boð um at flýggja teirri serligu trygdarnevndini hjá Kongressini øll skjøl, sum hava samband við iraksku oljuvinnuna. Á tann hátt vóna politikararnir at fáa innlit í viðurskiftini.

## Gaddafi leiðir friðarfund

Libyski leiðarin, Moammar Gaddafi, hevur gjørt av at skipa fyri einum fundi, sum skal hava til endamáls at loysa kreppuna í sudanska landspartinum Darfur.

Ein embætismaður í Tripoli segði í gjár, at stjórnin hevur boðið umboðum fyri Sudan, Tjad og Egyptaland á fundin, og at tveir uppreistrarfelagsskapir í Darfur eisini hava fingið innbjóðing til fundin. Ætlandi verður nigeriski forsetin eisini á fundinum, av tí at hann er formaður í afrikanska eindarfelagsskapinum.

Toppfundurin verður tann 15. ella tann 17. oktober, og ætlanin er, at umboðini skulu royna at finna eina varandi loysn í Darfur. Tey skulu eisini umrøða, hvussu tey neyðstøddu flóttafólkini kunnu fáa ta neyðugu hjálpina. ST, USA, ES, Afrikanski Eindarfelagsskapurin og Tann arabiska samgongan taka undir við hugskotinum hjá Gaddafi.

## ETA viknað nógv

Spanskir fjølmiðlar vilja vera við, at baskiski loysingarfelagsskapurin ETA er viknaður nógv, eftir at politiski leiðarin í felagsskapinum, Mikel Albizu, og 20 aðrir ETA-limir eru tiknir.

Tað var franska løgreglan, sum tók teir sunnudagin. Samstundis legði løgreglan hald á 600 kilo av spreingievnum, 660.000 patrónir, 112 granatir og 74 byrsur av ymiskum slagi. Summar keldur vilja vera við, at løgeglan fann eisini tvær rakettir av russiskum uppruna.

Ein spanskur hernaðarserfrøðingur sigur við sponsku bløðini, at eftir hansara tykki hevur ETA at kalla eingi vápn eftir. Løgreglan ásannar, at átakið sunnudagin hevur gjørt, at ETA er viknaður nógv, men samstundis verður stúrt fyri, at tað kann fáa felagsskapin at gera ein seinasta vørr.

## Loyniligur gravstaður

Myndugleikarnir í New York halda seg hava funið ein loyniligan gravstað hjá mafiuni í býnum.

Gravstaðurin er í býarpartinum Queens, og FBI heldur, at har finnast leivdirnar av nøkrum monnum, sum mafian hevur beint fyri. Serliga verður hugsað um fimm menn, sum hvurvu í sjeyti- og áttatiárunum, og løgreglan hevur alla tíðina verið greið yvir, at morðini høvdu samband við innanhýsis stríð ímillum teir ymsu bólkarnar í mafiuni.

Sambært blaðnum New York Daily Mail væntar FBI ikki, at gravstaðurin í Queens fer at loysa allar tær óloystu morðgáturnar, sum eru knýttar at mafiuni í New York, men hildið verður, at gravstaðurin kann í hvussu er loysa nakrar av hesum gátunum.

Hóast tann elsta morðgátan er frá 1978, hevur løgreglan arbeitt við málinum øll árini, skrivar New York Daily Mail.